# Sørvágs skúli

# Skrivlig roynd




**Mannagongdir fyri skrivligar royndir/próvtøkur**

**Stutt kunning um royndirnar til næmingar og foreldur**

- **Føroyskt:** *-Royndin í føroyskum er talgild.*

- Hvør næmingur hevur smátalarar/oyrnatelefon við (ikki bluetooth).
- Fimm tímar eru tilsamans settir av til máluppgávu og framseting.
- Hálvur annar tími er settur av til fyrisøgn, máluppgávu og lesifatan – ein hálvur tími til hvørja uppgávu. Eftir ein steðg verður farið undir framseting.
- Næmingurin kann brúka teldutøkar orðabøkur á www.sprotin.fo og annars alt annað tilfar, ið hann kann hugsað sær.

- **Danskt:** *-Royndin í donskum er talgild.*

.

- Hvør næmingur hevur smátalarar/oyrnatelefon við (ikki bluetooth).
- Fimm tímar eru tilsamans settir av til máluppgávu og framseting.
- Hálvur annar tími er settur av til fyrisøgn, máluppgávu og lesifatan – ein hálvur tími til hvørja uppgávu. Eftir ein steðg verður farið undir framseting.
- Næmingurin kann brúka teldutøkar orðabøkur á www.sprotin.fo og annars allar aðrar hjálpimiðlar.

- **Enskt:** *-Royndin í enskum er talgild.*
- Hvør næmingur hevur smátalarar/oyrnatelefon við (ikki bluetooth).
- Fýra og ein hálvur tími eru tilsamans settir av til máluppgávu og framseting.
- Hálvur annar tími er settur av til fyrisøgn, máluppgávu og lesifatan – ein hálvur tími til hvørja uppgávu. Eftir ein steðg verður farið undir framseting.
- Tá ið máluppgávan er loyst, verður ein steðgur og síðani verður farið til framseting.
- Næmingurin kann brúka teldutøkar orðabøkur á www.sprotin.fo og annars allar aðrar hjálpimiðlar.

**Støddfrøði:**

- Fimisrokningin er talgild, men greiðslurokningin verður skrivað á pappír.
- Tá næmingurin er liðugur við fimisrokningina, verður hon latin inn.
- Síðani verður ein steðgur, og eftir tað byrjar greiðslurokningin.
- Ein tími er settur av til fimisrokning og 4 tímar til greiðslurokning.
- 9.flokkur er bæði til fimis- og greiðslurokning.

**Fimisrokning:**

Her verður dentur lagdur á høvuðrokning. Roknimaskina er ikki loyvd, men annars eru vanligir hjálpimiðlar loyvdir eitt nú gamlar uppgávur og Støddfrøði handbókina, vanliga nevnd Gulabókin. Best er, um næmingurin hevur sína egnu Støddfrøði-handbók við.
Fimisrokningin er talgild, men næmingarnir gera útrokningar á pappírskladdu.

Amboð, ið eru hent at hava við til royndina í fimisrokning eru:

- Blýantur
- Viskileður
- Passari
- Vinkulmátari
- Støddfrøði handbók

**Greiðslurokning:**

Í greiðslurokning má næmingurin í størri mun <u>skilja</u> uppgávuna, finna upplýsingar til spurningarnar og loysa teir. Loysnin kann ikki standa einsamøll, men ein frágreiðing má vera, ið vísir, hvussu næmingurin er komin fram til loysnina. Tekningar kunnu tó gerast við blýanti. Teldan er hjáparamboð og til ber at fara á netið.

Amboð at hava við til royndina í greiðslurokning eru:

- Blýantur
- Pennur
- Viskileður
- Linjál
- Passari
- Vinkulmátari
- Roknimaskina
- Støddfrøði handbók

## <u>**Reglugerð í royndarhølinum**</u>

- Í royndarhølinum er friður!
- Næmingarnir skulu møta í góðari tíð og sita á sínum plássi 15 minuttir áðrenn royndin letur upp.
- Hava tit nakran spurning (WC,…) skulu tit rætta hondina upp, bíða til vaktin kemur til tykkara og lýða boðini hjá vaktini. Hetta er eisini galdandi, um tit skulu lána og ella bera ting aftur til floksfelagar.

<u>**Telefonir:**</u>

Telefonir eru ikki loyvdar í royndarhølinum. Næmingarnir kunnu lata telefonina liggja heima við hús ella leggja telefonirnar í ein telefonkassa, áðrenn royndin byrjar.
Næmingarnir fáa telefonina aftur, áðrenn teir fara til hús.